## DAGSINS MEINING

# Betri bústaðir – grundleggjandi mál

Ein stórur partur av teimum eldru kunnu hugsa sær at flyta í eina íbúð, tá tey eldast. Tað vísir ein kanning, sum Húsalánsgrunnurin hevur latið gera. Samstundis eru møguleikarnir at fíggja til dømis leiguíbúðir avmarkaðir, hóast stórur tørvur er á íbúðum til eldri, einlig, rørslu- og menningartarnað og til tey ungu.

Hetta kom fram á hoyringini, sum Arkitektafelagið skipaði fyri í síðstu viku um "betri bústaðir", nú felagið er 20 ár. Hoyringini var bæði áhugaverd, tankavekjandi og upplýsandi, men tíverri hevur tað, sum kom fram, ikki fingið nakra umrøðu.

Hóast tey flestu ásanna, at bústaðurin – heimið – er tað mest grundleggjandi í lívi okkara, er hetta eitt øki, sum í politiskum og samfelagsligum høpi næstan er burturtagt. Kommunur, feløg ella einstaklingar stykkja út, gera øki byggibúgvin, fólk ella fyritøkur byggja eftir ávísum treytum, onkur fíggjar og so ikki meiri.

Eingin heildarpolitikkur er á hesum týðandi og vitala øki, og hoyringin bendi á, at tað er so sum so við hugsjónunum, visiónunum, tá tað snýr seg um bústaðin. Ein nýggj lóg skal gerast fyri Húsalánsgrunnin og Íbúðagrunnin, men eingir tankar komu fram um fíggingarspurningin, ella kostnaðin at sita í húsi ella íbúð.

Kanningin hjá Húsalánsgrunninum, og annað sum kom fram í hoyringini, bendir á, at vit standa á einum vegamóti. Fólk eru helst um at koma úr kongstankanum at skula eiga sín egna bústað. Serliga eldri hava hug at flyta í eina minni íbúð, sum er lættari at halda, eins og einlig, kanska við barni ella børnum, ið ikki hava ráð at byggja hús.

Men fyri at kunna búgva fyri eina rímuliga leigu er neyðugt, at onkur letur eina grundupphædd. Tað kann t.d. verða landið, umvegis Íbúðagrunnin, kommunur ella fakfeløg. Men harafturat kemur so, at felagsskapur okkara – tað almenna – má fíggja bústaðir til tey, sum ikki sjálvi megna. Og inann hetta økið er tørvurin storur, hevur Javni víst á.

Eitt stórt evni, sum eigur at fáa eina nógv betri umrøðu. Eisini byggifrøðiliga, tí húsini standa eftir, eisini eftir at vit eru farin, sum víst varð á. Men ídag er støðan tíverri tann, at hundraðtals familjur og einstaklingar hava ikki ein líkinda bústað. Samstundis klúgva prísirnir upp eftir við rúkandi ferð, serliga í høvusstaðnum. Sostatt hava bara vælbjargað ráð at byggja ella keypa eini hús. Við øðrum orðum fáa vit eina sosiala slagsíðu, sum vit heldur ikki eiga at góðtaka.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Áheitan viðvíkjandi ósemjuni á arbeiðsmarknaðinum



**Jenis av Rana**
*løgtingsmaður*



**Bill Justinussen**
*floksformaður*

Flokksstjórnin í Miðflokkinum hevur á fundi týskvøldið h. 21.05.01 gjørt av, inniliga at heita á teir partar, ið varða av verkfallinum, at leita aftur til samráðingar, við tí eina í huga, at bjarga fólki og tjóð okkara undan tí hóttandi oyðileggjan, sum ósemjan kann føra við sær.

Uttan iva eru báðir partar samdir við okkum í, at støðan er hættislig, men eisini djúpt ólukkulig fyri tað fólk, sum eftir svára kreppu júst hevur fóta sær aftur. Og at eingin gerst vinnari, ikki ein- í síðsta enda gerast vit øll taparar.

Áheitan Miðfloksins er ein roynd at forða fyri og at avmarka óbøtandi avleiðingar.

Skjótari og dyggari enn nakar, harímillum bæði fiski- og búskaparfrøðingar, høvdu spátt, komu Føroyar úr aftur kreppuni, einans tí føroyingar vendu sær til Hansara, sum øllum valdar og fingu ta hjálpina, sum einans Hann kann geva tí, sum leitar til Hansara við sínum viðurskiftum.

Góðu fakfelagsleiðarar, arbeiðstakarar og -gevarar, finnið til samráðingarborðið aftur, í takksemi til Gud og Skaparan, og forðið fyri, at "oyðarin" fær fótafesti og brýtur niður aftur alt tað góða, ið givið okkum er.

# Sakligheitin, einaferð enn

**Lisbeth L. Petersen**
*løgtingslimur*



Landsstýrismaðurin við sjálvstýrismálum eftirlýsti fyri stuttum bert " ein farra av sakligheit" í viðmerking til fyrrverandi politikara úr øðrum flokki. Høgni Hoydal vildi hava "sakligar grundgevingar" tá sjálvstýrismálið varð viðgjørt.

Aftaná at hava lisið seinastu grein hansara um sjálvstýri ella ábyrgdarloysi og tey 4 %, kundi eg hugsa mær at vita, hvat Høgni Hoydal meinar við, tá hann brúkar orðið "sakligheit", tí er tað nakað greinin ikki ber á brá av, so er tað sakligheit.

Tey 4 %, sum hann og landsstýrismaðurin Torbjørn Jacobsen brúka at jonglera við, tá teir tosa um blokkstuðulin, skal eg ikki koma nærri inn á her, tí tað er so ruddiliga viðgjørt og mótprógvað av øðrum, men fyri at venda aftur til sakligheitina, so vendir og snarar Høgni Hoydal tí, sum ikki passar honum í samráðingarmálinum, sum hann, saman við øðrum, misti á gólvið.

Fyribils samráðingarúrslitið um framtíð Føroya, sum nú liggur á borðinum, hava teir sjálvir lagt upp til, og minkingina av heildarveitingini, sum alt Føroya fólk fer at merkja næsta ár, hava teir sjálvir biðið um. At teir so fara at geva Nyrup skuldina fyri allar trupulleikarnar, sum fara at vísa seg, eru vit so von við, so har verður onki nýtt.

Landsstýrismaðurin er ungur í politikki, og um tað er ókunnleiki ella fanatisma sum ger hann so blindan, skal vera ósagt her, men eitt skal so standa fast. Tá Høgni Hoydal tosar um sambandsflokkarnar, so er tað fyri okkum í Sambandsflokkinum ikki so áhugavert í tí sambandi, hvørjir hinir flokkarnir eru, sum hann meinar við, tí Sambandsflokkurin er, sum navnið eisini sigur, okkara flokkur, og tað navn og stevnuskrá standa vit við.

Er tað nakar flokkur, sum hevur fingið brigsl gjøgnum árini fyri at tosa um varisligan fíggjarpolitikk og sparingar, so er tað Sambandsflokkurin. At fígging ella fíggjarlig trygd skuldi vera, áðrenn kostnaðarmikil politisk tiltøk vóru sett í verk., hevur verið eitt hitt fremsta mál okkara. Afturhaldsflokkur hevur eisini verið eitt merki, sum aðrir hava sett á okkum í negativum týdningi, men at vísa afturhald í fíggjarviðurskiftum er ikki negativur eginleiki, tvørturímóti.

Nei, Sambandsflokkurin blæsir ongan búskap um koll. Tað vit uppliva í hesum døgum er júst tað øvugta, nevniliga at samgonguflokkarnir gera tað, bæði gjøgnum samráðingar og við broytingarætlanunum á búskaparliga økinum. Fyrstu úrslitini fara vit at síggja 1. januar 2002, tá tær fyrstu av teim 24 yvir-tøkunum, saman við fíggjarligu ábyrgdini, gerast veruleiki.

Politiska dreymaverð ber væl til at hava, tí hon kostar onki, soleingi hon bert er dreymur, men gerst hon veruleiki, er støðan ein onnur.

Sambandsflokkurin vil hava veruleikan fram, so øll skulu kenna sannleikan og velja eftir tí. Tað er týdningarmikið mál, sum henda samgonga skyldar øllum føroyingum at lýsa. Tá er tað vit hava brúk fyri sakligheitini frá báðum síðum.

Tá er sakligheit ikki nakað tú bert krevur av øðrum, soleiðis sum landsstýrismaðurin við sjálvstýrismálum ger tað !


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# Roynd í hægri matematikk

**Súsanna Dam**



Høgni varðir av eini eplaveltu. Hann og húski klára seg so dánt við grøðina úr veltuni, men á hvørjum árum restar umleið helvtin av setini til nýløguna komandi árið. Pól harafturímóti hevur nóg mikið av eplum, og higartil hevur hann latið Høgna fáa set frá sær, so at Høgni fær sett níður í alla veltuna. Seinnu árini hava verið góð til epli, og úrtøkan hjá Høgna og húski sjálvandi eisini góð. Í eini tvey ár hevur ikki verður líka stórur tørvur á seteplum frá Pól, sum onkuntíð áður. Høgni fær eitt ljóst hugskot, kundi hann ikki fyri allar tíðir sloppið undan at taka ímóti olmussuni frá Pól. Hann setist at rokna. Hann plagar sjálvur at hava fimm sekkir av set og at fáa fimm aðrar frá Pól. Gróðurin plagar at liggja ímillum 5 og 8 fold alt eftir líkindunum. Pól fær á hvørjum ári 2 sekkir av nýupptiknum eplum afturfyri setina. Roknistykkið hjá Høgna sær nú soleiðis út. 5 + 5 = 10 x 6,5 (ávøkstur meðalár) hetta gevur 65 sekkir av eplum um árið. Pól fær 2 sekkir, so eru 63 eftir. Um nú Høgni noktar at móttaka setepli frá Pól so hevur hann 65 - 5 sekkir altso íalt 60 sekkir og munurin verður altso 3 neyðars eplasekkir, og roknað í procentum sær soleiðis út

$$\frac{3 \text{ X } 100}{65} = 4{,}62\%$$

Høgni kláar sær í nakkanum, hesi fáu procentini síggjast ikki aftur í livistøði hansara, og honum nýtist enn ikki at minka um veltuna, so nú er at skunda sær, at boða Pól frá, at hann ikki skal ditta sær at lata meira set til eplaveltu Høgna og harvið spilla húski hansara við marglæti og ovurnýtslu. Nú er so spurningurin: Roknar Høgni rætt?

Svarið er áhugavert, men verður ikki avdúkað enn.

# Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag

**Høgni Hoydal**



Vísandi til munnligan fyrispurning frá Ingeborg Vinther, verður sagt frá:

Tjóðveldisflokkurin virðir og virkar fyri rættindunum hjá fakfeløgunum og pørtunum á arbeiðsmarknaðinum at skipa síni viðurskifti í sáttmálasamráðingum. Harundir eisini rættin at stríðast við teimum lógartryggjaðu amboðum, sum kunnu loysa trætur og ósemjur og áseta rættindir frameftir.

Teir politisku flokkarnir skulu ikki leggja seg út í ósemjur á arbeiðsmarknaðinum. Einasta undantak er neyðstøða í landinum. Teir politisku flokkarnir skulu heldur ikki stúra fakfeløgum og vinnufeløgum ella øvugt. Tá verður arbeiðsmarknaðurin fluttur inn á partapolitiska pallin og rættindi verða knýtt at partapolitikki og ikki at veruliga sáttmálavunnum rættindum.

Í sáttmálatrætum virka limir Tjóðveldisfloksins sjálvsagt frælst í sínum feløgum og stríðast sjálvsagt við egnari sannføring fyri felags rættindum.

Tí skipar Tjóðveldisflokkurin sum politiskur flokkur ikki fyri serligum tiltøkum í sambandi við verkfall, men viðurkennir at tjóðveldisfólk stríðast fyri síni hugsjón og sannføring á arbeiðsmarknaðinum, í feløgum og í gerandisdegnum sum heild.

# Loysing og verkfall

**Johan í Kollafirði**

Føroyingar eru skegir.
Teir snakka um milliardir og klandrast um oyrir.





# Rock-konsert í Losjuni í Gøtu

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 26/5 skipar Tónleikasamtakið Grót fyri rock-konsert í Losjuni í Gøtu. Luttakandi bólkarnir eru Krit, Marigold og The Jesus Band.

Talan er um tríggjar rættiliga nýggjar bólkar. Tveir teirra, Krit og Marigold, gjørdu við teirra sermerkta tónleikastíli vart við seg í undanumførunum til Prix kappingina. Báðir hesir bólkarnir vóru eisini við á Free Føroyar konsertini á læraraskúlanum.

Krit er mannaður av ungum havnarmonnum og einum klaksvíkingi. Teir spæla harðan og kontantan rokk tónleik, ið er eitt sindur í ætt við eitt nú KoRn og Marilyn Manson og Hatespeach. Teir hava tó sín egna stíl m.a. við einum sera karismatiskum sangara.

Bólkurin Marigold er mannaður av fimm eysturoyingum, við songkvinnuni Janu Jalgrímsdóttir á odda. Tey spæla melankolskan og minimalistiskan rokk tónleik, við íblástri frá eitt nú U2, Pearl Jam, Portishead, Skunk Anansie og Radiohead.

The Jesus Band hevur m.a verið at hoyrt á Gospel Festivalinum 2000. Hesin bólkurin er eisini mannaður við eysturoyingum. Talan er um rættiliga harðan rokktónleik, við íblástri úr m.a. klassiskum tónleiki.

Felags fyri hesar tríggjar bólkarnar er, at teir spæla progressivan og intensan tónleik, ið væl kann vera eitt boð uppá framtíðina í føroyskum rocki.

Konsertin byrjar kl 21:00.

